# Tróndur í Gøtu – okkara fyrsti m



Jógvan Fríðriksson, bispur, Hans Pauli Olsen, listamaður og Jóannes Eidesgaardl, løgmaður frammanfyri standmyndina av Trónda í Gøtu

**-Tað skal vera mín vón, at minnið um henda mann, skúlamannin, klóka telvaran og Føroya helst fyrsta intellektuella, fer at styrkja okkum í stríðnum at sigla nútíðar eins og framtíðar krøppu og lúnsku íður um Mjóvanes og úti á heimsins høvum, har landsins synir sigla segði løgmaður m.a. í røðu síni í Gøtu leygardagin, tá standmynd av Tróndi í Gøtu varð avdúkað.**

STANDMYND
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Müller og Ben Rasmussen*

-Tað er mær ein mikil heiður at avdúka standmyndina av størsta høvdinga í Føroya søgu, Tróndur í Gøtu. Hetta vóru fáu men avgjørdu orðini hjá Oddfríði Gregersen, tá hann seinnapartin leygardagin avdúkaði standmyndina av Tróndi í Gøtu í Gøtu. Sera nógv fólk vóru samankomin til hátíðarhaldið. Landsins hægsti politiski leiðari, løgmaður helt røðu og somuleiðis landsins hægsti andaligi leiðari, bispur. Eisini borgarstjórin í Gøtu røddi á hátíðarhaldinum. Og Tórshavnar manskór setti sín serstaka dám á.

Løgmaður Jóannes Eidesgaard segði m.a. :-Føroya søga varð skrivað av kristnum fólki í kristnari mentan. Tí varð Sigmundur sjálvsagda hetjan, sum kristniboðarin og vinur hjá Noregs kongi, meðan Tróndur, fríður í ásjón, reyðhærdur og frøknutur varð settur í døkt ljós og lýstur, sum óálítandi og grundarringur.

Sum frá líður, er tað tó júst hesin seinni, Tróndur, ið hevur vunnið sær alsamt rúmari pláss í hugaheimi føroyinga. Ikki bara er hann klókur og snildur, dugnaligur taktikari og góður vin-



Ein sera errin borgarstjóri eftir avdúkingina av standmynd



Oddfríður Gregersen avdúkar standmyndina



Tórshavnar manskór gjørdi løtuna ógloymiliga